## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Fíggarmálaráðið:

# Móttøka fyri tveimum nýggjum stjórum



*Arnold Hjelm Nielsen (v.m.) er settur í starv sum stjóri á Toll- og skattstovu Føroya og Snorri Fjallsbak er settur sum stjóri á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum*



*Óli Heinesen, ið nú er farin frá fyri aldur, hevur verið sjóri á Toll- og skattstovuni síðan 1998. Hann fekk hendan málningin av Eyðuni av Reyni, listamanni, sum gávu frá Fíggjarmálaráðnum*

**Hósdagin 12. januar var almenn móttøka í Fíggjarmálaráðnum á Argjum í samband við at Arnold Hjelm Nielsen er settur í starv sum stjóri á Toll- og skattstovu Føroya og Snorri Fjallsbak er settur sum stjóri á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Umleið hundrað fólk vóru til móttøkuna, ið var í matstovuni í Fíggjarmálaráðnum hendan dagin. Røður vórðu hildnar fyri bæði nýggju og fráfarandi stjórunum. Bárður Nielsen, landsstýrismaður, takkaði Óla Heinesen, sum hevur verið sjóri á Toll- og skattstovuni síðan 1998, fyri gott samstarv, og handaði honum ein gávu frá Fíggjarmálaráðnum, ið var ein málningur av Eyðuni av Reyni, listamanni. Myndevnið var útsýnið yvir Nólsoyarfjørð. Óli Heinesen er nú farin frá fyri aldur.

Á Toll- og Skattstovu Føroya er Arnold Hjelm Nielsen settur í starv sum stjóri. Hann tekur við eftir Óla Heinesen. Arnold er 41 ára gamal og útbúgvin verkfrøðingur. Seinastu tvey árini hevur hann verið varastjóri á Toll- og Skattstovuni, og hann hevur m.a. leiðsluroyndir frá svensku telefyritøkuni Ericsson í Noreg.

Á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum er Snorri Fjallsbak settur sum stjóri. Hann tekur við starvinum eftir Duritu Tausen, ið er farin í annað starv á Gjaldsstovuni. Hon hevur verið settur stjóri, síðani Thomas Magnussen fór úr starvinum 1. mars 2005. Snorri Fjallsbak er 56 ára gamal og útbúgvin cand. scient. Hann hevur starvast sum fulltrúi á Lønardeildini í 4 ár. Frammanundan var Snorri Fjallsbak lærari á studentaskúlanum í Hoydølum í 23 ár, eitt skifti umsitingarleiðari og eitt skifti rektari. Í fýra ár var hann formaður í Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.



*Bárður Nielsen, landsstýrismaður, og Bjarni Olsen, sparikassastjóri*



*Umleið hundrað fólk vóru til móttøkuna í Fíggjarmálaráðnum*